Pauli Einarsson í starv hjá Saga Petroleum

– Vit miða ímóti at vera við í fyrsta úthjóðingarumfarinu m, og nýggja skrivstovan í Havn er eitt týdningarmikið stig í okkara arbeiði, sigur forstjórin í Saga Petroleum Føroyar, Terje Haugevang

Eli Guttesen

Norska oljufelagið Saga Petroleum opnaði í gjár skrivstovu á Bryggjubakka 22 í Havn, har tryggingarfelagið Trygd hevur hildið til í mong ár.

Í fyrsta umfari, er ætlanin at manna skrivstovuna við tveimum fólkum, sum skulu taka sær av dagligu samskiftinum við føroysk ar myndugleikar og føroyskt vinnulív, til fyrsta útbjóðingarumfarið til oljuleiting á føroyska landgrunninum fer í gongd møguliga seinni í ár.

Geir Atle Rishovd frá Florø, sum fleiri ferðir áður hevur verið í Føroyum í oljuørindum, er settur sum dagligur leiðari av føroysku deildini hjá Saga. Hann kemur úr starvi sum deildarleiðari á skrivstovuni hjá Saga í Florø og hevur verið í starvi hjá Saga síðan 1990.

– Mær dámar væl føroyingar og kenni á mær, at vit hava felags uppruna. Eg gleði meg at flyta til Føroya og at vera við til at mynda okkara virksemi her. Eg eri glaður fyri at vera sloppin at arbeiða saman við einum føroyingi, sum eg havi stóra virðing fyri og væenti mær nógv av hesum samstarvi, sigur deildarstjórin Geir Atle Rishovd.

Pauli varaleiðari

Hin maðurin er føroyingurin Pauli Einarsson, sum hevur verið rættuliga nógv frammi í føroyskum oljuhøpi líka frá byrjan av. Hann hevur fingið starv sum varaleiðari á føroysku deildini hjá felagnum.

Pauli er ættaður úr Trongisvági og hevur útbúgving sum maskinmeistari. Hann hevur drúgvar royndir innan skipaferðslu og mekaniskt virksemi. Eitt skifti var hann á maritimu arbeiðsávísingini hjá ALS og sum formaður fyri Føroya Oljuídnað, sum er áhugafelagið hjá føroyskum vinnulívi hevur hann verið ein sentralur persónur í fyrireikingunum til, hvussu føroyskt vinnulív skal búgva seg til eina komandi oljuvinnu.

Umframt at hava verið formaður í Føroya Oljuídnaði hevur Pauli seinastu árini rikið ráðgevingarvirksemi fyri ymisk útlendsk oljufeløg. Hann ætlar nú at siga formanssessin frá sær í Føroya Oljuídnaði og lata onnur yvirtaka hansara ráðgevingarvirksemi, men hann leggur dent á, at hann fer at halda fram við góða samstarvinum við vinnuna og myndugleikar annars.

Fyrstu dagarnir fer Pauli at sita einsamallur á nýggju skrivstovuni, men frá 1. mars verður stjórin Geir Atle skrásettur, sum búgvandi í Føroyum, og tá verður Saga Petroleum Føroyar ætlandi eisini skrásett sum føroyskt felag.

Føroyar stóran áhuga

Við í norska ferðalagnum vóru heili fimm fólk frá Saga Petroleum, teirra millum sjálvur forstjórin Terje Hagevang, deildarstjórin Geir Atle Rishovd og kunningarleiðarin Finn Oluf Nyquist.

Hetta sigur ikki so lítið um stóra áhugan, sum felagið vísir Føroyum í løtuni. Forstjórin hjá Saga sigur, at felagið trýr uppá, at olja verður funnin í føroysku undirgrundini. Um teir ikki trúðu hesum, høvdu teir ikki komið til Føroya, sigur hann.

Virksemi hjá Saga Petroleum er merkt av oljuleiting og oljuframleiðslu. Saga fæst ikki við oljusølu eins og vit kenna tað frá til dømis Statoil og Shell.

Saga er ein fyritøka, sum fyrst og fremst arbeiðir við vinningi fyri eyga. Men ein av høvuðsorsøkunum til, at Saga nú hevur avgjørt at seta seg niður í Føroyum við egnari skrivstovu er at vera á staðnum tá avgerðirnar verða tiknar.

Felagið leggur stóran dent á tætt samstarv við føroyskar myndugleikar og føroyskt vinnulív. Felagið ætlar í mest møguligan mun at brúka føroyskar vørur og tænastur, um hesar eru kappingarførar.

Fyrstu tíðina fara vit at arbeiða við at skráseta føroyskar fyritøkur, sum kunnu vera við til at útbjóða vørur og tænastur, tá leitingarnar fara í gongd, sigur deildarstjórin, Geir Atle Rishovd.

Skulu føroyskar ídnaðar- og tænastufyritøkur gera seg galdandi sum veruligir útvegarir, er neyðugt at arbeiða miðvíst við førleikanum. Tað mest átøkiliga og viðkomandi kravið, sum fyritøkurnar longu nú kunnu arbeiða við, er at leggja til rættis góðskustýringarskipan. Hetta fer í øllum førum at bøta um kappingarførið hjá fyritøkunum, uttan mun til um olja verður funnin ella ikki.

Styrkin á djýpum vatni

Vit eru ikki nakað stórt felag, samanborið við onnur kend feløg, men vit klára okkum rættiliga væl kortini. Fíggjarliga standa vit rættiliga sterkir, og vit hava keypt nøkur smærri oljufeløg og hava tí deildir í rættiliga nógvum londum eftir hondini, sigur forstjórin hjá Saga, Terje Hagevang.

Okkara styrki er serliga leiting og boring eftir olju á djúpum vatni, og tað er ein av orsøkunum til, at vit eru komnir her. Vit vita, at um talan verður um olju í Føroyskum øki, kann gerast neyðugt at virka á djúpum vatni. Aðrastaðni virka vit heilt niðri á 3000 metra dýpi, sigur forstjórin Terje Hagevang.

– Fáa vit loyvi til at leita eftir olju í ár fer hetta at føra til leitivirksemi í øllum førum mestu fimm árini. Siga vit, at vit hava funnið olju í rakstrarverdum nøgdum ár 2002, kunnu útbyggingar fara fram næstu fimm árini, so klárt er til framleiðslu ár 2007, sigur forstjórin, Terje Hagevang.

Vón fyri føroyskari arbeiðsmegi

Sum áður sagt, so er tað fyrst og fremst vónirnar um fíggjarliga úrtøku, sum fær okkum hendavegin at leita og møguliga seinni at útvinna olju, sigur Terje Hagevang.

– Vit kunnu bjóða neyðugan kapital, sakkunnleika í leiting og framleiðslu. Síðan farið var undir forkanningar á sumri 1994 hava nøkur feløg brúkt føroyskar tænastur. So hvørt sum vit koma nærri at oljuútbyggingunum og veruliga framleiðsluni fer tørvurin á arbeiðsmegi úr Føroyum at økjast, sigur Terje Hagevang.

Tað, sum í fyrsta umfarið fer at geva føroyingum arbeiði, eru skrivstovur sum henda, og at brúk verður fyri fólki til flutning og arbeiði á eini útgerðarstøð. Roknast má tí við, at føroyingar fara at manna boripallar og annan boriútbúnað, sigur Terje Hagevang.

Longu nú hava rættiliga nógvir føroyingar størv í oljuídnaðinum uttanfyri Føroyar. Hesar royndir koma teimum til góða, um teir velja at søkja arbeiði í eini møguligari komandi oljuvinnu í Føroyum, sigur forstjórin hjá Saga Petroleum, Terje Hagevang

Hetta eru persónarnir, sum manna Saga Petroleum Føroyar. Frá vinstru virkandi stjórin, Geir Atle Rishovd, forstjórin, Terje Hagevang, og varastjórin, Pauli Einarsson, sum millum annað er kendur sum formaður í Føroya Oljuídnaði.

Mynd: Kalmar Lindenskov

– Kirkjan er føroysk frammanundan

Jákup Reinert Hansen, prestur, heldur uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum at yvirtaka Fólkakirkjuna er tómt – uttan innihald. Kirkjan verður ikki meir føroysk, enn hon er frammanundan av eini yvirtøku

Ingi Rasmussen

Seinnapartin í gjár varð endaliga avgjørt, um umsitingin av fólkakirkjuni skuldi yvirtakast av føroysku heimastýrinum.

Jákup Reinert Hansen, formaður í Føroya Prestafelag, vónaði av fullum hjarta undan viðgerðini í løgtinginum, at hetta bleiv av ongum.

Uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum er tómt. Vit vita einki um, hvat slag av kirkju ella hvat modell vit fáa við eini yvirtøku. Tað einasta, vit fáa at vita, er, hvønn dag yvirtøkan skal verða framd, sigur Jákup Reinert Hansen, formaður í Føroya Prestafelag.

Uppskotið var illa fyrireikað, heldur hann, og tað er ov tunt grundarlag at byggja eina so stóra yvirtøku uppá.

Jákup Reinert Hansen ger vart við, at hann úttalar seg bara egnu vegna, tí Prestafelagið hevur ongantíð viðgjørt spurningin.

Jákup Reinert Hansen undrast á, at politikararnir soleiðis royna at trýsta eitt mál ígjøgnum. Hann ger vart við, at málið ongantíð hevur fingið undirtøku í kirkjuráðunum. Hvørja ferð tey hava verið spurd, hevur svarið verið eitt greitt NEI.

Tað er sostatt eitt reint politiskt tiltak at yvirtaka føroysku fólkakirkjuna.

Discount-kirkja

Tað, sum Jákup Reinert Hansen óttast mest av øllum, eru fíggjarligu avleiðingarnar av eini yvirtøku.

Hann vísir til Grønland, sum nýliga hevur yvirtikið fíggjarligu ábyrgdina av teirra kirkju. Har hava royndirnar víst, at kirkjan hevur minni at ráða yvir. Hetta hevur havt við sær, at ein stórur partur av prestaembætunum innan kirkjuna ikki eru sett. Í staðin royna grønlendingar at gera neyðútbúgvingar at nøkta tørvin.

Nevnt verður í uppskotinum, at føroyingar longu frammanundan rinda tveir triðingar av samlaðu føroysku kirkjuverkinum.

Jákup Reinert Hansen vísir á, at føroyingar rinda sovorðið sum kirkjubygningar, meðan danir gjalda fyri prestalønir, prestagarðar og umsiting.

Trupulleikin, sum vit kenna frá vanligu samfelagslívinum við muninum á miðstaðarøkinum mótvegis útjaðarøkinum er galdandi fyri kirkjuna.

Tað kann verða trupult at røkja kirkjuna, um politikararnir seta loft á kirkjuskattin upp á 0,3 prosent, sum stendur í uppskotinum. Um yvirtøkan bara skal gerast á bíligasta hátt, ivist eg í, um politikararnir ynskja kirkjuni væl. So enda vit við at hava eina discount-kirkju, sigur Jákup Reinert Hansen

Kirkjan *er* føroysk

Eitt argument fyri at yvirtaka Fólkakirkjuna er, at føroyska kirkjan, sum av nógvum verður mett at vera nakað fyri seg, eigur ikki at verða stýrd úr Danmark.

Tað heldur Jákup Reinert Hansen heldur ikki, at hon er.

– Lívið innan føroyska kirkjugátt er rættiliga serføroyskt. Danir seta einki í gildi innan kirkjugátt. Teir gjalda leiðslu og jura og tílíkt, sigur Jákup Reinert Hansen.

Kirkjulívið verður ikki stungið út í kortið í løgum, reglum og kunngerðum.

– Kirkjan er ikki skorin eftir donskum leisti. Fólkakirkjan í Føroyum er nógv meiri sjónlig í gerandisdegnum enn í Danmark – og hon hevur nógv størri týdning í gerandislívinum hjá fólki, sigur Jákup Reinert Hansen.

Hann vísir í hesum sambandi á, at í Føroyum eru 20 prestar og 60 kirkjur. Flestu gudstænasturnar verða hildnar av ólærdum leikfólki – eitt nú deknum. Í Danmark er støðan hin øvugta. Ein stórur skari av lærdum fólki heldur gudstænastur – ofta í nærum tómum kirkjum.

Stutt skotbrá

Sambært uppskotinum um yvirtøku av Fólkakirkjuni skal føroyska kirkjan verða yvirtikin 1. januar ár 2000.

Hetta heldur Jákup Reinert Hansen vera eitt alt ov stutt skotbrá at fyrireika eina so stóra yvirtøku.

Alt kirkjulógarverkið er sera stórt og umfatandi. Og tað krevur góða tíð at fyrireika og smíða eitt nýtt lógarverk. Vit vita, at tey arbeiða ikki serliga skjótt í landsstýrinum, sigur Jákup Reinert Hansen.

Sum dømi nevnir hann Navnalógina, sum varð samtykt í 1992. Tá varð sagt, at ein avtala skuldi gerast við danir um sertreytir fyri føroyingar, sum búgva í Danmark. Tað er ikki gjørt enn.

Jákup Reinert Hansen heldur, at føroyska umsitingin er so mikið veik, at tað tekur nógv longri tíð at gera eitt dygdararbeiði.

Jákup Reinert Hansen mælir í staðin til, at nýggju lógirnar, sum løgtingið nýliga hevur samtykt, áttu at fingið møguleika at virka.

Tað eru einans góð sjey ár síðani, at Føroyar blivu sjálvstøðugt biskupsdømi.

Síðstu lógirnar eru nú staðni komnar, og eru avgreiddar í løgtinginum.

Ein yvirtøka av kirkjuni tekur tá avgerðina av ræði.

Nýggju lógirnar góvu okkum møguleika at fáa nýggja biskupsdømið at virka, sigur Jákup Reinert Hansen.

Fríkirkjur tað næsta

Jákup Reinert Hansen óttast fyri, at avleiðingin av einari yvirtøku í síðsta enda verður, at Fólkakirkjan, sum vit kenna hana í dag, dettur burtur. Tað merkir, at beinleiðis sambandið við eitt nú skúlan og Ólavsøku dettur burtur.

Fylgjurnar av eini yvirtøku beint nú kunnu verða, at kirkjan merkir ov trong kor undir eini politiskari leiðslu – og so loysir hon frá politisku skipanini og verður fríkirkja



Jákup Reinert Hansen, prestur, óttast fyri, at um føroyska kirkjan verður yvirtikin nú, so kundi tað havt við sær, at fólkakirkjan, sum vit kenna hana, bleiv avloyst av fríkirkjum

Skjóta til máls

Løgreglan er í holt við at kanna, hvør tað er, ið skjýtur til máls eftir bílum í Havn. Týsdagin gekk tað út yvir ein bil, sum stóð á einum parkeringsplássi í eysturbýnum. Ein rútur varð knústur, og í bílunum løgu blyggjhøgl.